umhvørvisstovan

## Umhvørvisgóðkenning

**Sambært kapittul 5 í Ll. Nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd**

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **Sp/f Univice** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Rókahavnin 8, 620 Runavík | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| Framleiðsla av bátum úr plasti við glastrevjum | |
| Matr. nr.: | V-tal |
| 93b og 93c | 588806 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 17/00250 | 17.08.2017 |

Umhvørvisstovan, tann 17. august 2017

Suni Petersen, deildarleiðari / Vivie Kirke Davidsen, umhvørvisviðgeri

## 1. Góðkenning

Henda umhvørvisgóðkenning av virkseminum hjá Univice er givið við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14. mai 2008, og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

Umhvørvisstovan fekk tann 25. apríl 2017 umsókn um umhvørvisgóðkenning av virkseminum hjá hjá P/F Univice (17/00250). Talan er um virksemi, sum er í bygningum á matr. 93b og 93c í Runavík.
Saman við umsóknini eru móttiknar tekning av bygninginum og innrætting og kloakkplanur.

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at fyribyrgja og avmarka dálking av luft og havi og ampar av óljóði, lukti o.ø.,
- at umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið
- at umhvørvisliga besta tøka tøknin (BAT[1]) í størst møguligan mun verður nýtt
- at reinsiskipanir eru undir regluligum eftirliti
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, skal minkast mest møguligt

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent til Univice og Runavíkar kommunu til viðmerkingar.

Ongar viðmerkingar vórðu til uppskotið. .

## 3. Lýsing av virkseminum

Virkið er á matr. nr. 93b og 93c, Rókahavnin 8 í Runavík. Sambært byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu er økið D1 øki, ið er havna- og vinnuøki.

Virksemið er m.a. ervnafrøðilig framleiðsla, sum er í bólki D.6 í fylgiskjalinum til løgtingslóg um umhvørvisvernd. Hesi virki eru fevnd av kapittul 5 í lógini, og skulu tí hava umhvørvisgóðkenning.

Virksemið á staðnum er í tveimum eindum. Annað er maskinverkstaðurin har framleiðslan er tilevning og og tilskering av deilum úr stáli. Hin eindin er framleiðslan av bátum úr plasti, sum er styrkt við glafipur.

Rávøran á virkinum er stál á maskinverkstaðnum og til bátaframleiðsluna ymisk kemisk evni, glasfipur o.a.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Univice hevur ikki stórt útlát av spillivatni, við tað at vatn ikki er partur av framleiðsluni.
Univice hevur ventilatiónskipan, og nakað av útláti til luft. Tað snýr seg serliga um loysingarevni og dust frá framleiðsluni.
Virkið hevur burturkastbingjur standandi inni á virkinum. Bingjurnar innihalda mest turt burturkast frá framleiðsluni. Burturkastið eigur at verða latið góðkendum móttakara.

---

[1] **Best Available Techniques.** Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum,avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

Ymisk kemisk evni verða nýtt í framleiðsluni, millum annað, styren, acetone, herdari, voks og paraffinloysingur. Hesi skulu verða partur av árligu umhvørvisfrágreiðingini. Sí 5.8.2.

Tey umhvørvisviðurskifti sum verða tikin við í umhvørvisgóðkenningini eru tey sum verða mett at verða tey týdningarmestu fyri útlát til umhvørvið á staðnum. Tað er av týdningi at luftútlát verða leidd burtur á rætta hátt.
Eisini skulu kemisk evni sum verða nýtt til framleiðsluna verða goymd og burturbeind á rætta hátt.

## 5. Góðkenningartreytir

Góðkenningin er givin við hesum treytum:

### 5.1 Almennar treytir

5.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð vera til taks á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini.
5.1.2 Univice hevur ábyrgd av at tryggja, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, m.a. við at gera mátingar, taka sýni o.a.
5.1.3 Um ampar verða av lukti, royki, óljóði, spillivatni ella øðrum, kann Umhvørvisstovan krevja, at virkið ger kanningar av útlátinum.
5.1.4 Møguligar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini ella av Umhvørvisstovuni, skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini. Univice kann tó taka sýni, um hetta verður gjørt samsvarandi viðurkendum mannagongdum.
5.1.5 Univice rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum.
5.1.6 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa broyting.
5.1.7 Um virkið skiftir eigara ella broytir navn, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta.
5.1.8 Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar og útgerð uttandura antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri umhvørvið, ella beinast burtur. Harafturat skal eigari tryggja at olja, kemikalii og annað ikki kunnu verða til ampa ella kunnu dálka umhvørvið, meðan virkið liggur stilt.
5.1.9 Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av, umframt at tilfar og útgerð uttandura verður beint burtur.
5.1.10 Allar treytir eru eisini galdandi fyri virksemi hjá veitarum, meðan teir arbeiða á virkinum.
5.1.11 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.
5.1.12 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.
5.1.13 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

5.1.14 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 5.2 Innrætting og rakstur

5.2.1 Virkið skal og verða innrættað, rikið og staðsett sum sagt er frá í umsóknini og øðrum móttiknum tilfari.

5.2.2 Univice skal miða eftir at brúka bestu tøku tøknina til framleiðsluna og til reinsing av luftútláti.

5.2.3 Um Univice ætlar at økja framleiðsluna, skal virkið søkja Umhvørvisstovuna um hetta frammanundan.

5.2.4 Arbeiði, har vandi er fyri spilli av dálkandi ella vandamiklum evnum, skal gerast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

5.2.5 Møguligir lekar ella óhapp við kemikalium ella rávøru skulu kunna haldast aftur á avmarkaðum økjum og skulu kunna takast upp.

5.2.6 Raksturin skal fara fram soleiðis, at øll økir, sum hoyra til støðina, eru ruddilig og rein.

## 5.3 Goymslur

5.3.1 Kemikalii og reingerðarevni skulu goymast soleiðis, at óviðkomandi ikki hava atgongd til goymslurnar.

5.3.2 Kemikaliigoymslur skulu hava kemikaliitætt gólv uttan frárensl til spillvatnsleiðing og vera skipaðar soleiðis, at útlát vegna lekar ella óhapp kunnu haldast aftur í kemikaliutøttum garði, bakka ella tanga.

5.3.3 Garður, bakki ella tangi skal kunna rúma nøgdini, sum kann vera í tí størsta ílatinum á staðnum.

5.3.4 Kemikaliigoymslur skulu hava hóskandi luftskifti, har vandi er fyri, at gass ella gassblanding kann elva til spreinging og brádliga økta dálking.

5.3.5 Flótandi og føst evni skulu goymast í íløtum, sum hóska til endamálið, t.d. UN góðkend, sum eru merkt soleiðis, at tað sæst, hvat er í.

## 5.4 Útlát til luft

5.4.1 Virksemið á Univice má ikki hava við sær ampar av lukti, royki ella dusti uttan fyri øki virkisins.

5.4.2 Allar útleiðingar til luft skulu leiðast uppeftir í minsta lagi ein metur upp um tekju.

5.4.3 Um ampar verða av lukti, dusti ella øðrum luftbornum árinum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

## 5.5 Spillivatn

5.5.1 Univice skal reinsa spillvatnið frá virkseminum soleiðis, at evni og tilfar í størst møguligan mun verða hildin aftur[2].

5.5.2 Møguligt spillivatn frá verkstaði ella maskinrúmi skal leiðast gjøgnum reinsiskipan so sum oljuskiljara, soleiðis at innihaldið av mineralskari olju í spillvatninum í mesta lagi er 10 mg/l.

5.5.3 Nýtsla av reingerðarevnum og øðrum evnum skal avmarkast mest møguligt og miðast skal eftir at nýta tey mest umhvørvisvinarligu evnini.

5.5.4 Sýnistøkubrunnur skal vera aftan á hvørja einstaka reinsiskipan.

5.5.5 Spillivatn frá virkinum má ikki bera brá av olju ella aðrari dálking.

5.5.6 Um spillivatn frá virkinum ikki verður latið í kommunala spillivatnsleiðing, skal tað leiðast á sjógv har rákið førir spillvatnið úr landi, har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.

5.5.7 Munnin á spillvatnsútleiðingini skal í minsta lagi verða 1 metur undir á størstu fjøru.

5.5.8 Elvir spillvatnsútleiðing til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skulu bøtandi atgerðir fremjast, so sum økt reinsing. Umhvørvisstovan skal kunnast um ætlaðar atgerðir.

---

[2] Kunngerð nr. 111 frá 2009 um spillivatn

## 5.6 Óljóð, ristingar og ljós

5.6.1 Univice skal miðja eftir at brúka bestu tøku tøkni og bestu mannagongdir at avmarka og doyva óljóð frá virkseminum.

5.6.2 Univice hevur ábyrgd av, at tey sum hava beinleiðis tilknýti til virksemi ella arbeiða á virkinum, arbeiða so ljóðskynsamt sum gjørligt.

5.6.3 Ískoytið til óljóðtyngdina við næsta grannamark frá virkseminum hjá Univice og beinleiðis avleiddum virksemið, má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk:

| Dagur | Klokkutíð | Tímar | Øki 1 dB(A) | Øki 2 dB(A) | Øki 3 dB(A) | Øki 4 dB(A) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 07-14 | 7 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 14-18 | 4 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Sunnu- og halgidagar | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 18-22 | 1 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22-07 | 0,5 | 70 | 60 | 40 | 35 |
| Hámarksvirði | 22-07 | | | | 55 | 50 |

Óljóðtyngdin: Óljóðstøðið, mált sum orkujavnað, A-vigað ljóðtrýststøði í dB(A) við næsta grannamark

Tímar: Miðal óljóðtyngdin fyri teir mest larmandi samanhangandi tímarnar í einum samdøgurstíðarskeiði, má ikki fara upp um markvirðið, t.d. má miðalvirði fyri 8 samanhangandi dagtímar (kl. 07-18) ikki fara upp um 45 dB(A) fyri Øki 4.

Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram

Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram

Øki 3: Blandað bústaðar- og Miðstaðarøki

Øki 4: Bústaðarøki

## 5.7 Burturkast

5.7.1 Alt burturkast frá virkseminum hjá Univice skal handfarast og skiljast í samsvari við kunngerð um burturkast[3] og galdandi reglum hjá móttakara.

5.7.2 Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

5.7.3 Burturkast skal altíð goymast í hóskandi íløtum ella bingjum, og ikki vera ampa ella elva til dálking.

5.7.4 Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum og goymast í týðiliga merktum hóskandi íløtum, t.d. UN-góðkendum íløtum.

5.7.5 Íløt við serliga dálkandi burturkasti skulu vera tøtt og standa á einum sjálvstøðugum og avbyrgdum tøttum øki.

5.7.6 Bingjur, íløt og burturkast, sum ikki kann vera í íløtum, skulu vera sett og tryggja soleiðis, at tey ikki fúka í vindi.

[3] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 5.8 Skrásetingar og umhvørvisfrágreiðing

5.8.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd av framleiddari vøru, gjørt upp í vekt av ymsu materialum sum eru brúkt til framleiðsluna
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti, býtt á slag og móttakara
- Reingerð av reinsiskipanum, títtleiki og nøgd av tilfari
- Nøgdir og slag av vaskievnum, sóttreinsingarevnum o.ø.
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

5.8.2 Univice ger hvørt ár eina umhvørvisfrágreiðing sum í minsta lagi inniheldur:

- uppgerð av rakstrarskrásetingunum
- møgulig kanningarúrslit og viðkomandi tulking av úrslitum
- uppgerð av samlaðum útlátum av kannaðu evnunum
- dálkandi óhapp,
- frágreiðing um umhvørvisskipan og umhvørvisviðurskifti,
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk o.a.,

sum skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mai í avloysandi árinum.

## 6. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.
Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Runavíkar kommuna, Heiðavegur 26, FO 620 Runavík
Landslæknin, Sigmundargøta 5, FO-100 Tórshavn, foe@sst.dk

Umhvørvisstovan, Traðagøta 38, Postboks 2048, FO-165 Argir, Tlf.: + 298 34 24 00, us@us.fo, www.us.fo